Kunngerðablaðið A

2025 Givið út 7. mars 2025

Nr. 19 3. mars 2025

**Kunngerð**
**um**
**gjøld fyri løggildingar, ávís eftirlit og loyvisbrøv frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum**

Við heimild í § 62 b, nr. 3, 7 og 8 í løgtingslóg nr. 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi, sum broytt við løgtingslóg nr. 40 frá 13. mai 2013, § 17, stk. 1 í løgtingslóg nr. 46 frá 15. mai 2007 um kavaravinnu og kavaraútgerð, og § 18 í løgtingslóg nr. 28 frá 30. apríl 2007 um spreingievni og spreingiarbeiði v.m., verður ásett:

**§ 1.** Ársgjald fyri løggilding av serkønum virki, sambært kunngerð um løggilding av serkønum veitarum mótvegis Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, er 4.000 kr.

**§ 2.** Gjøld fyri myndugleikaeftirlit, sum Arbeiðs- og brunaeftirlitið ger við lyftum o.ø., sambært kunngerð um uppseting og nýtslu av lyftum o.ø.:

1) Uppsetingareftirlit: 3.600 kr.
2) Regluligt eftirlit við fólkalyftum: 3.100 kr.
3) Regluligt eftirlit við góðslyftum, rullutrappum, byggilyftum o.tíl.: 1.400 kr.

**§ 3.** Gjøld fyri myndugleikaeftirlit, sum Arbeiðs- og brunaeftirlitið ger av dampketlum og trýstskipanum, sambært kunngerð um innrætting og nýtslu av trýstberandi útbúnaði:

1) Uppsetingareftirlit av dampketli: 5.000 kr.
2) Regluligt eftirlit við dampketli: 4.400 kr.
3) Trýstroynd av dampketli: 4.500 kr.
4) Uppsetingareftirlit av øðrum trýstskipanum, rørskipanum o.ø.: 6.000 kr.
5) Regluligt eftirlit við øðrum trýstskipanum, rørskipanum o.ø. við upp til 100 kg av kølievni: 1.200 kr.
6) Regluligt eftirlit við øðrum trýstskipanum, rørskipanum o.ø. við meira enn 100 kg og minni enn 5.000 kg av kølievni: 3.000 kr.
7) Regluligt eftirlit við øðrum trýstskipanum, rørskipanum o.ø. við 5.000 kg og meira av kølievni: 4.400 kr.

**§ 4.** Gjøld fyri loyvisbrøv, sambært kunngerð um loyvisbræv til kranar, gaffiltrukkar og onnur lyfti- og flutningstól, kunngerð um innrætting og nýtslu av trýstberandi útbúnaði og kunngerð um kavaraskúlar, kavaraskeið og góðkenda kavaraútbúgving:

1) Útskriva nýtt loyvisbræv: 1.200 kr.
2) Endurútskriva loyvisbræv: 500 kr.
3) Útskriva prógv, sum er burturblivið: 500 kr.
4) Umbýti av loyvisbrævi frá øðrum landi: 1.200 kr.

**§ 5.** Gjald fyri ummæli frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, sambært § 7, stk. 2 í kunngerð um innrætting av føstum arbeiðsplássum, er 3.000 kr.

**§ 6.** Gjald fyri góðkenning av spreingievnagoymslum, sambært § 1, stk. 7, § 3, stk. 1, § 4, stk. 2 og § 6, stk. 3 í kunngerð um goymslur til spreingievni, er 3.500 kr.

**§ 7.** Gjald fyri myndugleikaeftirlit, sum Arbeiðs- og brunaeftirlitið ger, sambært § 27, stk. 2. í kunngerð um útinnan av kavaraarbeiði á tryggan hátt, er 3.000 kr.

**§ 8.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 120 frá 22. august 2018 um gjøld fyri løggildingar, ávís eftirlit og loyvisbrøv frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum.

Umhvørvismálaráðið, 3. mars 2025

**Margit Stórá (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Pól Edvard Egholm (sign.)